


# 300 til Týsklands á ólavsøku

**TEENSTREET** Oman fyri 170 ungdómar og oman fyri hundrað hjálparfólk og leiðarar úr Føroyum fara í eina viku at taka lut í altjóða ungdómslegu, sum OM felagsskapurin skipar fyri



**Kristian Holbæk Kristensen**
Sangari í Froðbiar Sóknar Bluesorkestri og gestur á G!

**Hvat sigur tú um G! í regni, vindi og síðani betri veðri?**
G! Er festivalurIN í Føroyum!! Í regni, vindi og í sól. Soleiðis er tað, heilt einfalt.

**Hevur tú glett teg at sleppa at spæla á G!festivalinum?**
Ja, eg havi glett meg sera nógv. Eg havi veruliga glett meg at sleppa á pall á G!festivalinum.

**Tað, at tit eru fluttir frá hóskvøldinum og til fríggjadag, ger tað onki?**
Tað ger púra onki. Eg gleði meg bara at sleppa at spæla á G! Mær dámar sera væl G! Konseptið. Og so haldi eg eisini at tað er eitt herðaklapp at sleppa á pall á G!

Eyðun Klakstein

Upp undir Ólavsøku eru tey mong, sum ferðast til Føroya. Men í ár fer eitt stórt ferðalið úr Føroyum og til Týsklands, har tey í eina viku skulu taka lut í altjóða legu. Tað er OM felagskapurin, sum hevur kristiligt virksemi kring allan heimin, ið bjóðar inn til leguna. 173 føroyskir ungdómar í aldrinum 13-18 ár – tey flestu eru 15-16 ára gomul - fara í hesum sambandi til Týsklands. Ein lítil flokkur úr Føroyum luttók fyri fyrstu ferð á hesi stevnuni í 1999. Nógvu tey fyrstu árini luttóku so at siga bara ungdómar, sum hava sínar røtur í brøðrasamkomunum. Nú er hetta broytt soleiðis, at tað eisini luttaka ungdómar, sum hava røtur í heimamissiónini og hvítusunnusamkomunum.




Umfram ungdómarnar fara 40 leiðarar, og so eru fleiri, ið fara at hjálpa til við ymsum uppgávum soleiðis, sum tað er kent frá eitt nú Nesvík og Zarepta legunum.

Tað eru Anita og Oddmar Tausen á Toftum og Ruth Gaardlykke á Argjum, sum taka sær av at samskipa tiltakið. Hetta er ein uppgáva, sum tað verður arbeitt við mest sum alt árið, og í vár hevur verið skipað fyri kunningarátøkum fyri tey, og leiðarar og hjálparfólk hava verið saman ein dag til venjingar.

-Samlaða luttakaratalið úr Føroyum er 315. Samlaða luttakaratalið á leguni, sum er í Offenburg í Suðurtýsklandi, er umleið 3000. Størsta luttøkan er úr Týsklandi. Hini árini hevur næststørsta luttøkan verið úr Hollandi og síðani úr Svøríki, men nú vísir tað seg, at føroyska luttøkan í ár verður størri enn bæði tann úr Svøríki og Hollandi, sigur Anita Tausen.

Tað vísir seg, at familjurnar eru ikki so fáar, sum hava gjørt av at gera hetta til ein part av summarfrítíðini.

Hvat siga royndirnar, at ungdómarnir fáa burturúr?

-Talan er um tiltak, sum OM skipar fyri, og harvið er grundarlagið kristiligt. Tað verður ikki fjalt, at tað snýr seg um at ávirka luttakararnar andaliga, og afturmeldingarnar frá teimum ungu hava verið nógvar og góðar. At talan er um altjóða legu ber eisini við sær, at vinabond verða knýtt um landamørk, og at tey ungu og eisini hinir luttakararnir eitt nú læra um virði og mentanir hjá øðrum. Hetta er eitt upplivilsið fyri lívið hjá teimum, sum taka lut, og soleiðis vóna vit eisini, at tað fer at verða í ár, sigur Anita Tausen at enda.

eydun@sosialurin.fo

## Í MORGIN




Fyrrapartin lot til andøvsgul av suðri, seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.

## SUNNUDAGIN




Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

## MÁNADAGIN




Fleyr til gul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt, men mikudagin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. við Føroyar stendur mestsum í stað.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Føroyar fer spakuliga norðureftir og grynnist.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

**Hitalagið kring knøttin**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 11. juli | Tendring |
| 13. juli | Mánin næstur jørðini |
| 18. juli | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | 09:29 | 21:55 | 08:29 | 20:55 | 08:44 | 21:10 | 11:29 | 23:55 | 00:03 | 12:29 |
| 15. juli | 10:19 | 22:44 | 09:19 | 21:44 | 09:34 | 21:59 | - | 12:19 | 00:55 | 13:19 |
| 16. juli | 11:08 | 23:32 | 10:08 | 22:32 | 10:23 | 22:47 | 00:44 | 13:08 | 01:44 | 14:08 |
| 17. juli | 11:56 | - | 10:56 | 23:20 | 11:11 | 23:35 | 01:32 | 13:56 | 02:32 | 14:56 |
| 18. juli | 00:20 | 12:58 | 11:58 | - | - | 12:13 | 02:20 | 14:58 | 03:20 | 15:58 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | 07:44 | 20:10 | 06:44 | 19:10 | 09:44 | 22:10 | 10:44 | 23:10 | 09:14 | 21:40 | 10:29 | 22:55 |
| 15. juli | 08:34 | 20:59 | 07:34 | 19:59 | 10:34 | 22:59 | 11:34 | 23:59 | 10:04 | 22:29 | 11:19 | 23:44 |
| 16. juli | 09:23 | 21:47 | 08:23 | 20:47 | 11:23 | 23:47 | - | 12:23 | 10:53 | 23:17 | - | 12:08 |
| 17. juli | 10:11 | 22:35 | 09:11 | 21:35 | - | 12:11 | 00:47 | 13:11 | 11:41 | - | 00:32 | 12:56 |
| 18. juli | 11:13 | 23:52 | 10:13 | 22:52 | 00:35 | 13:13 | 01:35 | 14:13 | 00:05 | 12:43 | 01:20 | 13:58 |